Ferðslan á Fútakletti umløgd

Arbeiðið upp á tað stóra svingið norðan fyri Fútaklett fer at gera, at neyðugt verður at broyta ferðsluna á staðnum eitt sindur. Hetta fer at standa við, til undirsjóvartunnilin verður tikin í brúk
Mynd: Edvard Joensen

Í samband við vegagerðina til undirsjóvartunnilin verður ferðslan frá ferjuleguni við Oyrargjógv løgd um. Broytingin fer at vara, til tunnilin er latin upp

VEGAGERÐ
Edvard Joensen

á Fútakletti: Ferðslan til og frá ferjuleguni við Oyrargjógv fer at verða eitt sindur umskipað fram til upplatingina av undirsjóvartunnlinum. Talan verður um økið, har nýggi tunnilsvegurin verður bundin í verandi veg.

Har, sum nýggi tunnilsvegurin verður bundin í verandi veg millum Oyrargjógv og Sandavág, verður gjørt eitt rættiliga stórt sving. Hetta svingið verður gjørt liðugt nú beinanveg, meðan arbeiðið er í gongd, og so verður tað liggjandi, til tunnilsvegurin verður tikin í nýtslu, sigur Dávur Reinert Hansen, stjóri í partafelagnum Vágatunnlinum.

Fólk hava undrast á ta rættiliga stóru grótrúgvuna, sum løgd verður niðan fyri vegin sunnanvert Fútaklett. Ymsar gitingar hava verið um, hvat hetta er. Bummstøð, grótgoymsla og so framvegis, gita fólk.

Men svarið er sera einfalt, sigur Dávur Reinert Hansen. Hatta er svingið frá tunnlinum til Sandavágs. Bummstøðin fer at liggja við Kálvadalsá beint norðan fyri, har tunnilin kemur upp Vágamegin.

Hann greiðir frá, at svingið verður gjørt so stórt og lyft so høgt upp, fyri at fáa fyrsta teinin niðan á Háls so slættan og lættan sum gjørligt.

Men tað hevur so við sær, at neyðugt verður at gera hetta stóra svingið tvørtur um verandi veg. Og so verður aftur neyðugt at gera onkra umlegging av ferðsluni millum Oyrargjógv og bygdirnar í Vágum.

– Tað, sum fer at henda her, greiðir Dávur Reinert Hansen frá, verður, at ferðslan fer at ganga tvørtur um hetta nýggja svingið. Byrjað verður at koyra um nýggja svingið ein av fyrstu døgunum, uttan at kunna dagfesta tað heilt nágreiniliga, sigur hann.

– Men tað fara vit at fáa at vita í dag sum ein annan dag, og lýst verður væl og virðiliga beinanveg, gjørt er av, nær tað verður, sigur hann.

Tað verður soleiðis, at ein stikkvegur verður gjørdur oman av grótrúgvuni, sum seinni verður til sving. Bilarnir, sum ferðast hendanveg, skulu so upp ella niður av hesi rúgvuni. Tað merkir so aftur, at teir noyðast at tálma hesi ferðsluni, og er valt at gera tað við ferðsluljósum, sum sett verða upp á staðnum.

Dávur Reinert Hansen, stjóri í Vágatunnlinum, sigur, at hendan skipanin fer at vara alla tíðina frá tí, farið verður undir arbeiðið, til tunnilin verður tikin í nýtslu.

– Tað fer sjálvandi at tarna ferðsluni eitt sindur, metir hann, men væntar kortini, at fólk fara at góðtaka eina slíka neyðuga broyting í vanliga ferðslumynstrinum.

Gongur væl

Dávur Reinert Hansen letur væl at arbeiðsgongdini inni í undirsjóvartunnlinum. Teir halda tíðarætlanina gott og væl, sigur hann. Um gongdin verður, sum hon er nú, væntar hann, at hol verður undir Vestmannasundi um árasskiftið komandi. Hvørjumegin við, vil hann tó ikki siga nakað um. Í skrivandi stund vísa tølini, at teir hava borað 62% av samlaðu tunnilslongdini.

Hann sigur, at teir eru komnir niður í somu flágirnar Leynamegin, sum teir eru í Vágamegin, og tær eru góðar at arbeiða við, láta teir at.

Norðmenninir, sum hava arbeitt við slíkum fyrr, siga seg eisini vera væl nøgdar við tilfarið, sum teir arbeiða í.

– Men sjálvandi kann okkurt stinga seg upp enn, sigur Dávur Reinert Hansen, og vil líkasum biða fólk taka tað eitt sindur róligt.

Hann sigur, at onkur smávegis leki hevur verið, sum teir so hava tett við at pumpa betong inn í rivurnar. Onkustaðni verður stoypt runt, sigur hann, men tað verður kortini ikki soleiðis, at allur tunnilin verður fóðraður við betongi.

Tunnilin fer at líkjast teimum føroysku tunnlunum, sum eru frammanundan. Ljós verður inni, sum verður heldur betri enn tað í Kollafjarðartunnlinum, greiðir stjórin frá. Kaðal til telefon og útvarp verður drigin igjøgnum, eins og útluftingin verður góð. Viftur, sum fara at syrgja fyri, at tað alla tíðina er frísk luft inni, verða allan vegin í gjøgnum tunnilin.

Tað lekur altíð eitt sindur ígjøgnum fjallið, sum vit siggja tað í øllum tunnlum í Føroyum. Hendan lekan fara fýra pumpur at beina burtur. Tær verða so stórar, at hvør teirra til einahvørja tíð klárar 50 prosent av tí leka, sum er. Tað vil siga, at tað altíð er dupultur pumpukapasitetur til tað, sum kann koma niður undan loftinum.

Kemilux industri P/F, sum varð stovnað í 1965, er ein fyritøka í menning. Fyritøkan framleiðir sápuúrdráttir og umboðar harumframt ymiska reingerðarútgerð og kemisk evnir og hevur 11 fólk í starvi. Felagið, ið selir vørur innanlanda og uttanlanda, arbeiðir í løtuni við at menna søluna á heimamarknaðinum og søkir í tí sambandi eftir

Sølufólki

at byrja **1. oktober 2001**.

Starvið, ið er eitt fulltíðarstarv, verður fyribils sett fyri eitt hálvt ár, ið verður at roknað sum ein royndartíð. Starvið er fjølbroytt og avbjóðandi og snýr seg í høvuðsheitum at selja okkara vørur til heimamarknaðin t.v.s. skip, bátar, virkir og stovnar runt um í landinum.

Tú kemur saman við sølustjóranum og øðrum sølufólki at leggja arbeiði til rættis, soleiðis at okkara vælvirkandi søludeild kann mennast.

Førleikakrøv:
Vit vænta at tú hevur royndir innan søluarbeiði og at tú dugir at nýta tey mest vanligu telduforritini. Sum persónur vænta vit at tú ert ágrýtin og dugur at arbeiða sjálvstøðugt, og at tú hevur góð samstarvsevnir.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi **innan 24. september 2001**, og verða at senda til:

partafelagið KEMILUX® industri

Mykinesgøta 1
Box 1231
FO 110 Tórshavn

F r y st rst rv l v kk t lf r rk rt n,
yl u l st nn n ll v nnu k r

V t tv s n
l st kk r• kk n •T •M rkr•Et k tt r
Kn v r•K tl r•H vur•H n sk r•Sv ntur
Ym skt lt l n n n r s vn• n n r vn
l tt r• v n t l vnn v kk t lf r

...s lv n tl st rsn

DANAK
DNV

FARPACK

www.f r ck.m

Føroya Egg útbyggir:

Eftirspurningurin er størri enn framleiðslan

Nýggi bygningurin hjá Føroya Eggi er reistur. Um seks mánaðir eru 7.500 hønur í høsnarhúsinum
Mynd: Jonhard Hammer

Mikudagin varð nýggja høsarhúsið hjá Annfinni Brekkstein reist. Nú skal talið av hønum meira enn tvífaldast

ÚTBYGGING
Stefan í Skorini

Tað gongur strúkandi við eggvirkinum á Velbastað. Húsið hevur ikki langa tíð á baki, tí Føroya Egg sendi tey fyrstu eggini á marknaðin í juli í fjør, og longu nú verður bygt út. Pláss skal vera fyri fleiri hønum, so at føroyski brúkarin kann fáa egg alt árið.

Higartil hevur tað verið soleiðis, at tá eitt lið av hønum ikki verpur meira, so skuldi eitt nýtt lið av hønum fáast inn. Hetta tók einar tveir mánaðir, og hesa tíðina kundi Føroya Egg ikki veita føroyska kundanum egg.

– Eg kann ikki liva við, at veitingin frá okkum ikki er støðug. Tí mugu vit byggja út, so at vit kunnu hava tvey lið av hønum inni í senn, sigur Annfinn Brekkstein, eigari av eggvirkinum.

Við tveimum liðum av hønum í høsnarhúsinum steðgar veitingin av eggum ongantíð, men heldur á hóast hønurnar mugu skiftast út.

Annfinn sigur, at tað ikki er nakar trupulleiki at sleppa av við eggini í Føroyum, og at eftirspurningurin er nógv størri, enn virkið megnar at framleiða.

Nýtt hús reist

Nú er nýggi parturin av høsnarhúsinum reistur. Hetta fer at tvífalda framleiðsluna av eggum. Húsið verður ikki tikið í nýtslu fyrr enn í februar næsta ár, og tá verða 7.500 hønur á Velbastað. Tær fara at verpa umleið 1,8 milliónir egg um árið. Í løtuni hevur húsið 3.100 hønur.

Í desember mánaði verður bygningurin liðugur. Tá verður innrættað við reiðrum og maskinum til framleiðsluna. Um tvær vikur verða elementini sett upp, og bygningurin innilokaður.

Annars verða egg framvegis framleidd hjá Føroya Eggi, tí gamla høsnarhúsið koyrir við fullari ferð, og hetta lið er við at toppa í sínari framleiðslu.

Annfinn Brekkstein væl nøgdur við gongdina higartil við tí nýggju verkætlanini. Tað einasta hann ikki kann liva við er, at eggini ikki koma í jøvnum streymi úr høsnarhúsinum.

– Vit eru spakuliga við at menna eina nýggja vinnu í Føroyum, og tað hevur gingið væl higartil.

Nýggjur dagstovnur við 70 plássum

Mánadagin lat ein nýggjur dagstovnur upp í Øksnagerði í Havn. Hann fer at hava pláss fyri eini 70 børnum

BARNAGARÐUR
Stefan í Skorini

Stórur tørvur er á ansingarplássum, og hetta sæst aftur við at nýggir dagstovnar lata upp. Dagstovnurin í Øksnagerði er tann nýggjasti í røðini.

Har verða pláss fyri eini 70 børnum, tá hann er liðugur. Ein stova verður til smábørn um tvey ára aldur, ein stova verður til børn við serligum tørvi og tvær stovur eru ætlaðar størri børnum undir skúlaaldur.

20 børn vera í hvørjari stovu, men í stovuni fyri børn við serligum tørvi er bara pláss fyri 10-12 børnum.

Enn er barnagarðurin ikki liðugur, og tí eru bara tvær stovur tiknar í nýtslu, og har eru átta børn í hvørjari. Triðja stovan verður klár til brúk um fáar dagar, men tann seinasta stovan er ikki klár fyrr enn í november.

Tað er eitt sindur óheppið, at barnagarðurin ikki er liðugur til tíðina. Foreldur høvdu fingið at vita, at hann fór at vera liðugur um hesa tíðina, og tí má stovnurin taka ímóti børnunum beinanvegin.

Eini fimtan starvsfólk fara at vera knýtt at stovninum, tá øll børnini eru flutt inn.

Tveir nýggir

Ætlanin er at tveir nýggir stovnar skulu standa klárir at taka í nýtslu komandi summar. Býráðið hevur ætlanir um at byggja tveir stovnar við 120 ansingarplássum tilsamans. Ein stovnur verður á Løgmannabreyt og hin verður á Hamrinum á Argjum. Harumframt arbeiðir Føroya Tele við at gera ein ansingarstovn.

Dagstovnurin í Øksnagerði lat upp herfyri, og pláss verða fyri 70 børnum tilsamans
Mynd: Álvur Haraldsen

Skálabúðin
síðsti útsøludagur leygardagin



Ymiskir BH 83,- - 98,-
Reastútsøla klædnaplagg
-20%
3 viskustykkir 39,-
Gardin tøy m.a. tømut 48,- pr. mtr.
Svartir tranch jakkar prísur 948,-
BH høgir C-D-E skál prísur 398,-
Djnu og kodda vár 198,-
BH Flaunt w/ boyle, sáraur staddir prísur 198,-
Eyðka tilboð einara frigjadagin og leygardagin
Spinion buksir 2 par fyri 350,-
Trunsir 3 par frá str. 38-52 95,-
Stórir beige dúkar broderaðir 1/2 pris Nú 398,-
Stórir dúkur 1/2 pris heklaðir Nú 298,-
Jersey fasonigk hvitt, gull-mintgrønt prísur 98,-
Skálabúðin
Dr. Jakobsensgøta 11 - Tlf 214214